# Hósdagur 17. februar

**Sjónvarp Føroya**

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Mariann Djurhuus Poulsen á Strondum lesur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Morgun Føroyar** - Hilmar Jan Hansen er vertur
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Mariann Djurhuus Poulsen á Strondum lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Tilvera - Fimta barnasjúkan** (e) - Armgarð Arge leggur til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Øld eftir øld** (e) - Søguligt yvirlit eftir Hans Jacob Debes professara. Fyrra sending. Jógvan Arge lesur.
11.30 **Tónleikur í trettan øldir** (e) - 3. sending. Kári Sverrisson stílar yri
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e) - Sigmar Bláberg leggur til rættis
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindi**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stíla fyri
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Mildrið Jacobsen stílar fyri
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Framhaldssøga**
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið**- Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Lindin – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Tónleikur**
14.00 **Norðurlendskur tónleikur**
15.30 **Barnaløtan**
16.00 **Tónleikur fyri ung**
17.00 **Lovsangur**
18.00 **Bønartænastan**
19.00 **Sjómanssendingin »Vitin«** (e)
20.00 **Barnaløtan** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð**(e)
21.00 **Bønarlinjan** v/ ym. luttakarum

**Rás 2**

9.00 **Lættur tónleikur**
9.45 **Orðið** - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Tónleikur**
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Middagstónleikur**
13.00 **Norðlendskur tónleikur**
14.00 **Elvis Presley og Gospel (e)** (2. partur) - Heri Simonsen leggur til rættis
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Tónleikur**
16.00 **Seinnapartur** - Løtt innsløg. Smátíðindi. Tónleikur
17.00 **Barnasendingin** - Anja Hansen leggur til rættis
17.30 **No Stress tónleikur**
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Nátturðatónleikur**
19.00 **Highway 83** - Ungdómssending. Miðlabreytin. Tónleikur, ítróttur, spurnarkapping o.a. - 10. flokkar í Havn leggja til rættis
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Tónleikur frá 90'árunum**
22.00 **Jukebox** - Lurtarin velur løgini. Telefon. 359999, fax 359990 ella E-mail. ras2@post.olivant.fo
23.00 **Orðið**(e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen

**SVF**

18.15 **Upp á tá** 3
18.30 **Øskufía** 7:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika** við Grannum okkara
20.50 **20. øld** 4:12 - ensk dokumentarrøð
21.45 **Krimitímin: Harri yvir heiðini**2:3
22.35 **Ferðafrásøgn: Fjallatúrar**
23.25 **South Park** 13 - am. kult-teknirøð
23.45 **Liðugt**

**Eurosport**

7.30 **Cross-Country Skiing**
9.00 **Bobsleigh**
11.00 **Ski Jumping**
12.30 **Athletics**
13.30 **Snowboard**
14.00 **Biathlon**
16.00 **Motorsports**
16.30 **Alpine Skiing** - live
17.30 **Tennis** - live
19.30 **Alpine Skiing** - live
20.15 **Athletics**
21.15 **Boxing**
22.00 **Sumo**
23.00 **Motorsports**
23.30 **Trial**
0.30 **Close**

**TV3**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.15 **TV-shop**
8.10 **Hvide Løgne**
8.35 **Alle tiders barnepige**
9.05 **Ricki Lake**
10.00 **Hun så et mord**
10.55 **Horton-sagaen**
11.45 **Horton-sagaen**
12.35 **Drew Carey**
13.05 **Sjov og Spas**
13.30 **Panter-tanter**
14.00 **Det lille hus på prærien**
14.55 **Interne affærer**
15.50 **Sjov og Spas**
16.20 **Ricki Lake**
17.15 **Dagens Nyheder på TV3**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Sabrina - skolens heks**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Efterlyst**
20.00 **Gitte og Camilla i sneen**
20.30 **Heksene fra Warren Manor**
21.25 **SexOrama**
21.55 **Alle tiders barnepige**
22.25 **Dagens Nyheder på TV3**
22.35 **Drew Carey**
23.00 **Vore værste år**
23.30 **I lyst og nød**
0.00 **Ti tommelfingre**
0.30 **Monty Pythons flyvende cirkus**
1.00 **Ellen**
1.25 **Caroline, karrieren og kærligheden**
1.50 **Hvide Løgne**
2.20 **Godnat**

**BBC World**

0.00 **World News**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News**
1.30 **Holiday**
2.00 **News**
2.30 **The Money Programme**
3.00 **News**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News**
5.30 **How Buildings Learn**
6.00 **World News**
6.30 **Europe Direct**
7.00 **World News**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **World News**
8.30 **The Money Programme**
9.00 **World News**
9.30 **HARDtalk**
10.00 **World News**
10.30 **Holiday**
11.00 **The World Today**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **World News**
13.15 **World Business Report**
13.30 **The World Today**
14.30 **How Buildings Learn**
15.00 **World News**
15.30 **HARDtalk**
16.00 **World News**
16.30 **The Money Programme**
17.00 **World News**
17.15 **World Business Report**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **World News**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **World News**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **World News**
20.30 **Earth Report**
21.00 **World News**
21.30 **World Business Report**
22.00 **World News**
22.30 **Europe Direct**
23.00 **World News**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC Prime**

0.00 **TLZ: »The American Dream – Pastures of Plenty«**
1.00 **TLZ: »Science Collection – Colour by Numbers«**
1.30 **TLZ: »Science Collection – Radioactivity«**
2.00 **TLZ: »Galoi's Enduring Legacy«**
3.00 **TLZ: »Out of the Melting Pot«**
4.00 **TLZ: »Japanese Language and People«**
4.30 **TLZ: »Japanese Language and People«**
5.00 **TLZ: »Twenty Steps to better Management – Drama – TV«**
5.30 **TLZ: »Starting Business English«**
6.00 **Jackanory: »Treasure Island«**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Get your own back**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »Family Reunion«**
8.20 **Change that: »Stoke«**
8.45 **Kilroy: »He won't lift a Finger«**
9.30 **EasteEnders**
10.00 **Antiques Roadshow**
11.00 **TLZ: »Heavenly Bodies«**
11.30 **Ready, Steady, Cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Change that: »Stoke«**
13.00 **Style Challenge: »Family Reunion«**
13.30 **EasteEnders**
14.00 **Ground Force: »Newport«**
14.30 **Ready, Steady, Cook**
15.00 **Jackanory: »Treasure Island«**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Get your own back**
16.00 **Classic Top of the Pops**
16.30 **Keeping up Appearances**
17.00 **The Brittas Empire: »Laura's leaving«**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EasteEnders**
18.30 **Vets in Practice: »Holding on«**
19.00 **Dinnerladies: »Scandal«**
19.30 **Fawlty Towers: »Basil the Rat«**
20.05 **Casualty: »Looking after Number One«**
21.00 **Shooting Stars**
21.30 **John Session's likely Stories: »Corinna discovers the Wo«**
22.00 **The Perfect Blue**
23.30 **Songs of Praise**

*TV3 - Hósdagin kl. 20.00:*

## Gitte og Camilla i sneen

Feraðasending

Tær báðar fyrrverandi Robinson-genturnar, Gitte Schnell og Camilla Wisøfeldt hava skkift úr bikini í skíklæði. Nú eru tær farnar til Alpurnar fyri at vita, hvussu danskarar standa seg á skíbreytunum har suðuri. Fyrsta ferðamálið er St. Anton í Eysturríki. Her skal nýbyrjarin, Camilla, á skískúla, men hin meira roynda Gitte, skal royna seg í 2330 metra hædd. Komin á tindin, er hon tó ikki heilt vís í, at hon megnar ferðina niður aftur.

Eftir ein drúgvan dag á skíunum, skulu tær báðar um kvøldið upplivað, hvat »after-skiing« er fyri nekað, og her er einki afturhald.

*TV3 - Hósdagin kl. 20.30:*

## Heksene fra Warren Manor

Amerikonsk sendirøð



Abraxas stjelur Skuggana Bók og fer at avtaka eina rúgvu av forbannilsum. Hetta viðførir, at fleiri av gomlu fíggindunum hjá Piper og Phoebe koma aftur. Genturnar uppdaga eisini, at Abxa kanska fer at avtaka tað forbannilsi, sum hevur givið teimum heksakreftirnar, men hetta er Prue nú als ikki so kedd um. Hon heldur seg nevnliga hava skuldina fyri deyða Andys.

*TV3 - Hósdagin kl. 21.30:*

## SexOrama

Erotisk dokumentarsendirøð

SexOrama lyftur dýnuna og kannar eftir, hvussu sexlívið hjá danskarum veruliga er. Passar tað, at danir duga betur í seingini, ella verður seingjarfimleikurin heima hjá hr. og fr. Danmark íðkaður við slóktum ljósi og gardinum fyri vindeyguni?

Fáa vit ov lítið av sex, ella tosa vit ov nógv og gera for lítið við tað. SexOrama fylgir trimum pørum, teimum ungu, teimum vaksnu og teimum eldru – og tosa um teirra sexspøl.

Eisini verður hugt nærri at donskum áhuga-pornofilmum, har vanligir danir innspæla pornofilmar heima í stovuni. Hvat ger, at fólk vilja vísa teirra sexlív fyri øðrum menniskjum, og hvør tendrar av at hyggja eftir hesum.







# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Nógv andlit ganga aftur

*Fótbóltur: Størri parturin av spælarunum, sum nú skulu venja við U-18 landsliðnum, mannaðu U-16 landsliðið fyri tveimum árum síðani*



*Avbjóðingarnar hjá U-18 landsliði okkara verða størri í ár enn tær nakran tíð hava verið. Fleiri av leikarunum hava áður roynt seg á U-16 landsliðnum*

Tað ber á rætta borðið í menningini av framtíðar landsliðsspælarum í føroyskum fótbólti. Hetta er sjón fyri søgn í fyrstu úttøkuni til U-18 landsliðsvenjingina, sum verður annað vikuskiftið á Svangaskarði.

Meiri enn helmingurin av spælarunum, sum fyrr í vikuni fingu bræv frá Jógvani Martin Olsen, venjara, um at møta fríggjadagin 18. februar klokkan 18, hava altjóða royndir. Tað vil við øðrum orðum siga, at spælararnir vita longu nú, teir so smátt eru farnir at fyrireika seg til landsliðsárið, vita teir, hvat fer at verða kravt av teimum, og tað er sjálvsagt ein ógvuliga stórur fyrimunur.

### Hópurin

Í 1998 spældi U-16 landsliðið í NM kapping í Íslandi og í EM undankapping í Føroyum. Tá vóru nógvir av teimum, sum nú skulu venja við U-18 liðnum, á U–16 landsliðnum. Nú eru teir so mikið tilkomnir, at teir hava aldur at spæla í vaksnamannadeildunum samstundis sum teir í summar fara at seta dám á unglingaliðini.

Teir nítjan spælararnir, sum hava fingið boð at møta til venjingar eru Pól Næs Joensen og Niels Joensen, B36, Jann Ingi Petersen og Kristian Poulsen, B68, Elfinn Ørvarodd, SÍF, Jack Johansen, MB, Arnold Berg, Skála, Áki L. Hansen, Fróði Jóanesarson, Bergur Djurhuus og Brynjolvur Nielsen, NSÍ, Bjarni Jørgensen, Vagnur M, Mortensen og Jón Rói Jacobsen, HB, Atli Danielsen, Símun Joensen, Kristian á Lakjuni, Hjalgrím Elttør og Kartin Joensen úr KÍ.

### Skráin

Tey seinnu árini hevur ikki verið gjørt so nógv við venjingina hjá U-18 landsliðnum so tíðliga á árinum. Vanliga hava teir ikki vant saman fyrrenn eftir summarsteðgin, og so hava teir luttikið í EM undankapping eina ferð í oktober.

Í ár er hetta øðrvísi, og tað kemst av, at avbjóðingarnar eru fleiri, enn tær hava verið undanfarin ár. Spælararnir hava longu verið saman eina ferð – 22. januar – og sambært fyribilsskránni skulu teir hittast aftur til venjingar 17. og 18. mars, og í mai og juni er ætlanin, at teir skulu venja fleiri ferðir, og at teir skulu spæla fleiri venjingardystir.

Í tíðarskeiðnum frá 3. og til 8. juli skal U–18 landsliðið taka lut í einari altjóða kapping í Leipzig í Týskalandi. Í august og september er aftur ætlanin at skipa fyri felags venjingum og venjingardystum, og í oktober verður so stóra avbjóðingin á skránni.

Tá skal landsliðið luttaka í EM undankapping í Italia. Hini liðini í bólkinum eru Italia, Ongland og Andorra. Skráin hjá føroyska liðnum sær soleiðis út: 7. oktober verður Italia mótstøðuliðið, 9. oktober verður spælt ímóti Onglandi, og 11. oktober verður spælt ímóti Andorra.

Talan er um velduga avbjóðing. Fótbóltssambandið tykist hava lagt eina skilagóða venjingar– og dystarskrá, og so eru tað venjarin og spælararnir, sum hava ábyrgdina av at arbeiða so miðvíst og skilagott, at tað besta fer at spyrjast burturúr.

JH

# Í.S.B. til Malmø

*Í dag fara 20 føroysk ítróttarfólk til Svøríkis, har stór kapping verður hildin í Malmø*

Jákup Mørk

Seinastu árini hevur tað verið fastur táttur, at føroyingar taka lut í stóru svensku kappingini, Malmø Open, har ítróttarfólk úr øllum norðanlondum luttaka.

Í dag fara so ikki færri enn 20 føroyskir luttakarar avstað, har av 13 teirra skulu luttaka í kappingini, meðan hini 7 eru við sum venjarar og hjálparfólk.

### Svimjing og Boccia

Ítróttargreinarnar, sum føroyingarnir luttaka í, eru svimjing og boccia, og er talan um bæði rørslu- og menningartarnað ítróttarfólk.

Tey, sum í ár manna føroyska landsliðið eru Øssur Guðmundsson, Elvin Weihe, Jógvan Brøðraberg, Theodor Esmar Hansen, Jonhard Haraldsen, Anni Petersen, Símun Petur Zachariasen, Jimmy Nielsen, Durita Strøm, Marius Hansen, Jóanes Ziska, Jógvan Telling og Áki Joensen



*Jonhard Haraldsen er millum teirra, sum í dag fara til Malmø at kappast*

# Meistaravitjan

*Havnar karatefelag hevur um vikuskiftið vitjan av einum av fremstu karata íðkarunum í heiminum*

Jákup Mørk

Ein av teimum ítróttargreinum, sum vit vanliga ikki hoyra so nógv um her heima, er karate. Tó so, íðkararnir her á landi eru fleiri, og flestu teirra gera nógv við venjingina.

Vanligt er í øðrum ítróttargreinum, at íðkararnir eisini av og á vitjan av útlendskum ítróttaríðkarum og -leiðarum, so teir á tann hátt kunnu fáa nakað av íblástri. Hetta er sjálvsagt eisini galdandi hjá teimum, sum íðka karate, og tað er ikki hissini vitjan, sum tey í gjár fingu úr Danmark.

### Heimsins besta

Tað er nevnliga soleiðis, at danski landsliðsvenjarin, Lone Hansen, er komin hendavegin at læra eitt sindur frá sær, og saman við sær hevur hon ein annan danskan ítróttaríðkara, Michael Catalan.

Lone telist sjálv millum fremstu karate íðkararnar yvirhøvur, og hjá kvinnunm er hon tann, sum hevur hægstu gradina í heiminum. Umframt at hon sjálvsagt hevur nýtt nógva tíð til ítróttina, hevur tað eisini eydnast henni at gerast doktari innan ítrótt og sálarfrøði, so einki er at ivast í, at fakligi førleikin á økinum er í lagi.

Michael Catalan hevur í mong ár talst millum bestu íðkararnar í Danmark, og millum annað hevur hann vunnið DM ikki færri enn fimm ferðir.

### Avstað sunnudagin

Sum nevnt, so komu tey bæði til landið í gjár, og í kvøld byrjar so venjingin. Vanliga eru venjingarnar hjá felagnum úti í róðraneystinum á Argjum, men orsakað av, at okkurt tiltak skal vera har um vikuskiftið, verður skeiðið hildið uppi í HB húsinum.

Byrjað verður kl. 18.00 í kvøld, og leygardagin verður so vant við fullari ferð, so luttakararnir kunnu fáa so nógv á skaftið sum gjørligt. Tey bæði, Lone og Michael fara aftur til Danmarkar sunnudagin.

Havnar Karatefelag hevur í ár 10 ár á baki, og eru einir 100 limir í felagnum. Tey, sum luttaka aktivt í venjingini eru tó eini 50 í tali, og venja tey eini tríggjar til fýra ferðir um vikuna.